útvega grundstykkir og líknandi.

Hungursneyðin kostaði nógv mannalív. Hetta førdi til sosialan ófrið í landinum. Hildið varð, at keisarin hevði ov lítið av umsorgan fyri teimum svøltandi.

Hetta førdi til, at í september 1974 varð keisarin settur frá. Eitt hernaðarráð tók valdið, í fyrsta umfari í navninum hjá krónprinsinum, meira ella minni tvungið. Men tað var skjótt, at tað heldur ikki var pláss fyri honum, og keisararadømið varð avtikið.

Á pappírinum var tað eitt hernaðarráð, Dergen, sum hevði ovasta vald. Bert orðið Dergen fekk seinni hárini at reisa seg á fólki av ræðslu. Fyrst vóru ognir hjá keisaranum tjóðartiknar og síðan privat virkir og stór jarðarøkir.

Sum áður greitt frá, áttu fólk so mikið av jørð, sum tey kundu dyrka til egna nýtslu. Men tað vóru jarðareigarar, sum áttu størsta partin av jørðina. Fólkið arbeiddi hjá teimum fyri løn. Hetta er ein skipan sum vinstrahallar kollveltingar altíð hava havt ringt eyga á. "Loysnin" var at taka jørðina og býta hana út til fólkið. Hetta ljóðaði væl, men trupulleikin er bert tann, at verður hetta ikki gjørt við skili, gerst støðan enn verri hjá tí meiniga manninum, sum ætlanin er at hjálpa. Hetta vísa allar royndir aðra staðni frá. Tað var eisini júst tað, sum hendi her. Jørðin fór í órøkt og grøðin minkaði munandi.

## Kollveltingin át síni egnu børn

Upprunaliga vóru tað fleiri bólkar í kollveltingini. Teir komu eisini at stríðast um valdið sínámillum. Í 1977 var tað tann mest víttgangandi parturin undir leiðslu av Mengistu Haile Mariam, sum fekk endaliga valdið. Eftir blóðugar útreinsingar fram til 1979, har minst 10.000 mótstøðufólk vóru fyribeind, varð eingin ivi um, at Mengistu hevði tryggjað sær veruliga valdið í landinum. Tað var tó ikki fyrr enn í 1987, at hann fekk heitið av forseta.

Hann knýtti landið nær til Sovjetsamveldið og Cuba. Hann fekk samstundis stóra hernaðarhjálp til at halda seg til valdið. Eitt úrslit av hesum var, at nógvir smádreingir vórðu tiknir frá foreldrunum og sendir til Cuba at "læra upp". Vápnini úr Sovjet vóru sera framkomin, og tey kravdu servitan bæði til at brúka og til at umvæla. Hesar fortreytirnar vóru als ikki til staðar hjá fólki, men partvíst enn nýtti spjót sum vápn. Henda stóra hernaðarhjálpin skuldi eisini forða fyri, at Eritrea og Ogaden skuldu loysa seg frá Etiopia.

Tað komu eisini læknar úr Kina. Hesir vóru á donskum kallaðir "barfodslæger". Teir høvdu ikki tann stóra førleika. Teir høvdu eina stutta praktiska útbúgving og hjálptu eftir førimuni.

Teir vóru dámligir menn. Sum fólkið á staðnum hevði ikki stóra tiltrúgv til teirra. Skemtandi varð sagt, at teir góvu tríggjar litir av tablettum: reyðar til sjúkur omanfyri hálvsvølin, gular niður til nalvan og grønar fyri sjúkur frá nalvanum og niður eftir. Eg spurdi, hvussu leingi teir ætlaðu at vera her. Jú, til allir trupulleikar vórðu loystir. Tað kundi koma at taka langa tíð!

Í fyrsta umfari merktu vit ikki so nógv til kollveltingina. Hesar hendingar fóru fram í Addis Abeba og haðani var langt suður til okkara. Vit frættu bert í radio, hvat ið hendi. Hesi tíðindini vóru sjálvsagt litað av makthavarunum. Vit høvdu onga telefon. Tó høvdu vit tá fingið eina radiotelefon, sum var opin hálvan tíma fyrrapart og tað sama seinnapart. Annars kundu vit frætta frá onkrum, sum kom higar ørindini ella á vitjan.

## Gjørdust syndabukkar

Men tað gjørdist tó rættuliga skjótt greitt, at vit eisini fóru at standa fyri skotum. Slíkar stýris-skipanir skulu jú hava sínar synda-bukkar. Ofta eru tað útlendingar, sum standa fyri skotum.

Teir søgdu, at vit trúboðarar vóru imperialistar, og at vit bara vóru komnir fyri at útarma og únytta fólkið. Fólk vórðu heilavaskað, og hetta varð eisini galdandi fyri mong trúgvandi. Tað var hetta, sum var so syndarligt. Boðskapurin í radio var hvønn dag: "Sendið teir heim, koyrið teir út." Men samstundis boðaðu valdsharrarnir útheiminum frá, at tað var trúarfrælsi, so tað bar heldur ikki so væl til beinleiðis at koyra okkum av landinum. Her kom ein stór atsókn móti teimum trúgvandi. Tey blivu pínd, og tað vóru nógv, sum misti lívið fyri sína trúgv. Onnur vórðu koyrd í fongsul og illa viðfarin. Seinni í røðini verður greitt meira frá hesum.

Í fyrsta umfari fingu vit stóran part av fólkinum ímóti okkum. Vit fingu brøv frá ymiskum, har vit vórðu løgd undir líkt og ólíkt. Onkur av trúboðunum toldi hetta ikki, men fór heim. Eg fekk eisini mítt.

Tað var ræðuliga ringt. Eg hevði fingið eitt kall at hjálpa fólkinum.



*Kirkja í eini bygd í Konso. Uttanfyri sæst Emma, systir Elsu. Hon var á vitjan 1975. Tá býttu tey enn korn út í samband við hungursneyðina. Hon tók myndir av hjálpiarbeiðinum*



*Inni í viðtalurúminum*

Nú bóðu tey okkum fara heim og kallaðu okkum apur, imperialistar og líknandi. Eg bað Gud siga mær, hvat eg skuldi gera.

Kommunistarnir lovaðu teimum gull og grønar skógir. Hesum trúðu nógv í fyrsta umfari. Men sum tíðin leið, gekk tað bert verri og verri í landinum. Fólk gjørdist fátækari og fátækari, men vit vóru tey somu. Tað, sum vit høvdu sagt, og tað sum vit høvdu gjørt, tað broyttidst ikki. Tey komu aftur til okkara, og vit fingu tey sum vinir á ein nógv betri hátt enn áður.

## Kirkjan styrknaði

Ágangurin móti teimum kristnu førdi til eina undirgrundskirkju. Fólkið tordi ikki at koma í tær vanligu kirkjurnar. Tey samlaðust úti í bygdunum. Men tey máttu fara varðliga fram. Tey tordu ikki at syngja, tí tað kundi hoyrast. Tey lósu nøkur skriftstøð, tey dugdu uttanat.

Kirkjan styrknaði í Etiopia í hesum trongu tíðunum. Tá sóu tey, at tað kostaði at vera ein trúgvandi.

Tey fyrstu 14 árini eg var í Etiopia undir Haile Selassie, var tað kanska sum tey kalla tað í Kina, tey rískristnu. Tey fingu hjálp og skúlagongd frá trúboðarunum, og roknaði seg tí fyri at vera kristin uttan altíð at vera tað í hjartanum.

Hesi vóru tey fyrstu at fella frá, tá ið kommunisman kom saman við nøkrum av hinum.

**Komandi partur:**
Nú byrjar tað rættuliga at merkjast, at kristindómurin ikki verður toldur. Ágangurin verður verri og verri